# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*– OL er ikki byrjað enn, men tað er longu nú super feitt at vera til OL*
*Katrin Olsen*



*Eitt er vist. Øll liðini fara ikki at standa sum vinnarar. Og tað er tað áhugaverda og stuttliga við fótbólti*

*Savnsmynd*

# Skulu røkka málsetninginum

**Fleiri av liðunum hava hvílt og broytingar eru framdar í hópinum. Føroysku feløgini fara komandi vikurnar í hvør sínum lag at stríðast fyri at røkka sínum málsetningi, har gleði og vónbrot fara at merkja kappingarendan**

UPPTAKT
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Feløgini eru trýst. Áskoðarar, stuðlar og leiðslur krevja nógv av leikarunum, sum næstan hvørt vikuskifti komandi mánaðirnar skulu syrgja fyri, at hesi ikki verða vónbrotin í vetur. Summi vilja hava føroyameistaraheitið, onnur altjóða fótbólt, meðan nøkur vilja sleppa undan niðurflyting. Margirnalar fara at avgera, um ein ávísur venjari framvegis stendur við stýrisvølin í komandi kappingarár, og somuleiðis fara margirnalar at avgera, um ávísir leikarar framvegis verða partur av hópinum í komandi kappingarári. Tað skal stríðast – fyri heiðursmerkjum, gleði og framtíðini.

## Færri mál

Verður hugt nærri at talinum av málum, sum eru skotin í ársins útgávu av Formuladeildini, so eru tey higartil færri enn áður. Í 2006 vóru 238 mál skotin eftir 15. umførum, meðan talið í ár er 199.

Nógv hevur verið prátað um, at liðini ikki í sama mun leypa á mótstøðuna. Óttin fyri einum møguligum tapi vigar hægri enn viljin at fáa øll stigini. 16 ferðir hevur talan higartil verið um javnleik, sum er fýra fleiri enn um sama mundi í fjør.

Stóri málslúkurin í fyrsta triðinginum av kappingini var Arnbjørn Hansen úr EB/Streymi. Hann hevur higartil skotið 11 mál, sum eru sjey minni enn toppskjúttin í Formuladeildini í fjør. Miðaltalið hjá øðrum skjúttum er hinvegin væl lægri enn fyri einum ári síðan.

Støðið á dystunum hevur har aftrat verið sera skiftandi. Tað er helst ein avleiðing av taktikstu uppleggunum, har stigini hava væl størri týdning enn spælið. Og tað er sjálvsagt, um stuðlar og viðhaldsfólk skulu vera nøgd. Fleiri av undirhaldandi spælararunum hava heldur ikki altíð verið líka stuttligir at hugt at.

Fleiri av yngru leikarunum eiga stórt rós uppiborið, har leikarar sum Jóan Símun Edmundsson, Róaldur Jacobsen og Høgni Midjord,hóast sín 16 og 17 ára aldur, longu hava gjørt vart við seg millum teir bestu.

## Broytingarnar

Eins og undanfarin ár hava feløgini í summarsteðginum framt broytingar í leikarahópinum. Størsta skiftingin hevur verið í B36, har landsliðsleikararnir Súni Olsen og Jákup á Borg eru millum nýggju andlitini.

Meðan summi feløg fingu fatur í leikarunum, tey hava dyrgt eftir, so hevur gingið heldur truplari hjá øðrum. Sandoyingar hava í fleiri mánaðir leitað eftir nýggjum verjuleikara, men hóast samband var við tveir, so er framvegis eingin sáttmáli skrivaður. Spurningurin er, um Eli Hentze, venjari, harmast um hetta. B71 hevur einki mál fingið ímóti sær seinastu trý umførini – men framvegis hava teir fingið næst mest mál ígjøgnum higartil.

## EB/Streymur tevjar gullið

Støðan í Sundalagnum minnir ikki sørt um hana, sum EB/Streymur var í fyri tveimum árum síðan. Teir vunnu sær trygga leiðslu á stigatalvuni, men tríggir ósigrar upp í slag hevur aftur givið kappingarneytunum eina vónina. Vónina um at endurtaka bragdið hjá HB, sum fyri tveimum árum síðan í seinasta takinum vann seg fram um felagsliðið. Vónbrotið hevði helst verið upp aftur størri hjá steypavinnarunum, um sama søgan endurtók seg. Nú skal gullið í Sundalagið.

Úrslitini hjá HB hava ikki verið nøktandi higartil, og høvuðsstaðarfelagið strembar fyrst og fremst eftir Evropa. Við frágongdini av Christian Høgna Jacobsen og Jákupi á Borg verður satsað upp á egi fólk, sum somuleiðis kunnu brynja seg til komandi kappingarár.

Stórur spenningur er eisini í botninum av deildini. Skála, B68 og B71 stríðast fyri at sleppa undan niðurflyting. Vanliga verður sagt, at hevur tú vunnið tær fleiri enn 20 stig, so skuldu verið sloppið. Soleiðis verður helst ikki í ár, har B68 og B71 liggja ájøvn við 14 stigum.

Men eitt er vist. Øll liðini fara ikki at standa sum vinnarar. Og tað er tað áhugaverda og stuttliga við fótbólti.